## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind av landsynningi og seint um kvøldið regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og ælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og leygardagin yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin stundum regn ella mjørki. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Trailari koppaður við 13 tonsum av meyrusýru

ÓHAPP

*Ingrid Bjarnastein*

**Kollafjørður:** Ein trailari við 13 tonsum av meyrusýru koppaði á bryggjuni í Kollafirði í mánamorgunin. Talan var um trailara hjá Hera Thomsen, sum var komin við meyrusýru og øðrum fóðuri til MBM fóður.

Tá Sosialurin kom framvið tíðliga seinnapartin í gjár vóru brandmenninir í holt við at rudda uppaftur.

– Stuðulsbeinini við síðuna av vogninum vóru ikki komin út, og tí brast bingjan niður í keiina, greiðir Theodor Petersen, leiðari á MBM fóður frá.

– Sjálvur trailarin koppaði, og eg haldi eisini, at hann bognaði, og hann varð sleipaður burtur fyrr í dag.

Í bingjuni, sum setast skuldi niður á jørðina, vóru 13,2 tons av meyrusýru. Henda sýran, ið er sera eitrandi og etsandi, verður brúkt millum annað til sóttreinsan av ILA-raktum laksi og til súrhoyggj.

– Sum vit vita um higartil, so er bert hol komið á tann eina tangan av teimum 11, sum vóru í bingjuni. Tað vil siga, at 1,5–2,0 tons av meyrusýru eru farin fyri skeytið, sigur Theodor Petersen.

Eisini fóður var í bingjuni, og fer meginparturin av tí burtur. Talan er um eini 5–6 tons av seyðafóðri, bygg og øðrum.

Fyrrapartin í gjár var framvegis ruddað upp, men óvist er, hvussu nógv at sýruni er likið á sjógv.

– Vit hava spulað við vatni, og so hava vit eisini eitt evni sjálvir her, sum neutraliserar sýruna, og tað hava vit roynt at brúkt. Men vit hava hugt á sjógv, og tað vísir seg, at fiskar svimja framvegis í sjónum stutt frá landi.

Theodor Petersen dugir enn ikki at siga, hvussu nógv veruliga er farið fyri skeytið, men hann roknar í øllum førum við at tað, ið oyðilagt er, hevði eitt virðið upp á eini 100.000 krónur.

– Men tað er týdningarmikið at fáa við, at vit hava onki endaligt úrslit av skaðanum enn, sigur Theodor Petersen at enda.





*Ein trailari koppaði mánamorgunin. Í bingjuni vóru yvir 13 tons av meyrusýru*

*Mynd: Finnur Justinussen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | 24 |
| Halifax | 24 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 18 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 26 |
| Moskva | 26 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 32 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 996 hPa í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1010 hPa á 50N-40V fer í landnyrðing eystan og dýpist.




Eitt djúpt lágtrýst vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og gevur nógvan vind og avfall hósnáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 12/08 kl. 06[00]– 13/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,4°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 12/08 kl. 06[00]– 13/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 14,1 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

8. aug.: Tendring
10. aug.: Mánin næstur jørðini
15. aug.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. aug | 11.57 | — | 10.57 | 23.22 | 11.12 | 23.37 | 01.33 | 13.57 | 02.33 | 14.57 | 10.12 | 22.37 | 09.12 | 21.37 | — | 12.12 | 00.48 | 13.12 | 11.42 | — | 00.33 | 12.57 |
| 15. aug | 00.22 | 13.00 | — | 12.00 | — | 12.15 | 02.22 | 15.00 | 03.22 | 16.00 | 11.15 | 23.54 | 10.15 | 22.54 | 00.37 | 13.15 | 01.37 | 14.15 | 00.07 | 12.45 | 01.22 | 14.00 |
| 16. aug | 01.39 | 14.19 | 00.39 | 13.19 | 00.54 | 13.34 | 03.39 | 16.19 | 04.39 | 17.19 | — | 12.34 | 11.34 | — | 01.54 | 14.34 | 02.54 | 15.34 | 01.24 | 14.04 | 02.39 | 15.19 |
| 17. aug | 02.58 | 15.25 | 01.58 | 14.25 | 02.13 | 14.40 | 04.58 | 17.25 | 05.58 | 18.25 | 01.13 | 13.40 | 00.13 | 12.40 | 03.13 | 15.40 | 04.13 | 16.40 | 02.43 | 15.10 | 03.58 | 16.25 |